# Dátukassi, ymiskt um Mánan

| | |
|---|---|
| Frástøða frá Jørðini í miðal: | 384.400 km |
| Mesta frástøða frá Jørðini: | 405.500 km |
| Minsta frástøða frá Jørðini: | 363.300 km |
| Miðvik (eccentricity): | 0,0549 |
| Miðalferð í ringrásini: | 3680 km/h |
| Siderisk* umferðartíð: | 27,322 samdøgur |
| Synodisk* umferðartíð: | 29,531 samdøgur |
| Áshall*: | 6,68° |
| Ráshall*: | 5,15° |
| Tvørmál: | 3476 km |
| Tvørmál (Jørðin = 1): | 0,272 |
| Nøgd: | $7{,}348 \cdot 10^{22}$ kg |
| Nøgd (Jørðin = 1): | 0,0123 |
| Miðalevnisnøgd: | 3340 kg/m$^3$ |
| Rýmingarferð: | 2,4 km/s |
| Tyngd á ýtuni (Jørðin = 1): | 0,17 |
| Miðalhiti á ýtuni: | um dagin: 130°C<br>um náttina: –180°C |




* Siderisk umferðartíð er tíðin til eitt umfar sammett við stjørnurnar. Synodisk umferðartíð er tíðin til eitt umfar sammett við Sólina, t.e. tíðin frá tendring til næstu tendring. Áshall er vinkulin ímillum umferðarás og snúningsás. Ráshall er vinkulin, sum rásin víkur frá sólflatanum (ekliptika).

---

# Mánin eina sól

Atdráttarmegin frá Sól og Mána virkar til at gera flóð og fjøru á jørðini og tann streym, ið av teimum kemur. Tó at Sólin er so nógv tyngri enn Mánin, er hon so langt burturi, at hennara ávirkan verður munandi minni.

Hjá okkum og øðrum sjófarandi fólki hevur tað tí havt stóran týdning at hava skil á støðu Mánans á luftini.

Í tendring (sólkomu) eru flóðaldurnar frá Sól og Mána í samstøðu og styrkja hvør aðra. Tá er streymurin harður (mysing). Sama er í fullari sól (Mánin fullur). Er fyrra kvartal ella kvartalaskifti í fyllandi sól, er streymloysi, góður streymur, tí mánaflóðalda og sólflóðalda toga hvør móti aðrari. Sama er í hvørvandi sól. Flóðaldurnar frá Sól og Mána koma ikki hvør fyri seg, men heldur soleiðis, at mánaflóðaldan (sum er meira enn tvær ferðir so stór sum sólflóðaldan) veksur í tendring og fullari sól (mánin fullur), og so er mysing. Á sama hátt minkar hon, tá ið kvartalaskifti eru (mánin er hálvur), og streymloysi er.

Tann mynd av streymi, sum her er strikað upp, er einfaldað nógv. Í veruleikanum eru fleiri ymisk viðurskifti, sum virka á streymin. Eitt nú kunnu vit nevna, hvussu langt Mánin er frá Jørðini. Er Mánin næstur Jørðini um somu tíð, sum tendring ella fullmáni er, verður mysingin hørð, og er hann longst frá jørðini, verður mysingin lin. Somuleiðis verða ring ella góð streymloysi, tá ið Mánin er næstur Jørðini ella longst frá Jørðini í kvartalaskifti. Eisini er at nevna, at alla tíðina skiftir, hvussu høgt Sól og Máni standa á luftini, soleiðis at ryggurin á flóðaldunum stundum flytur seg norðureftir og stundum suðureftir. Flóðaldurnar standa haraftrat ikki beint undir Sól ella Mána, men eru støðugt í afturhond. Tað ger jarðarsnúningurin.

Sjóvarføllini nevna vit vestfall og eystfall. Fløðandi streymurin fer mest vestureftir og verður nevndur vestfall, og fjarandi streymurin fer mest eystureftir og verður nevndur eystfall. Undantøk eru frá hesi reglu. Vestfallið verður eisini rópt norðurrák og eystfallið suðurrák, tí firðirnir í Føroyum venda mest í útnyrðing-landsynning (Nólsoyarfjørður undantikin).

Yvirskriftin yvir hesum pettinum er: "Mánin eina sól". *Ein sól* er tíðin frá tendring til næstu tendring. Hjá teimum gomlu, sum bara høvdu árarnar at líta á, hevði tendring (sólkoma) stóran týdning. Teir roknaðu eisini tíðina eftir Mánanum, og fast hildu teir gomlu upp á sólkomunøvnini: vetrarsól, jólasól, torrasól, gøsól, einmánasól, gýtusól, summarsól, økusól, sól í hoyna/í fleyg (á fuglaplássum), sól í akurskurð, skurðsól, klippingsól umframt millumpartasól at skjóta inn ímillum jólasól og torrasól, tá ið munurin millum sólárið og mánaárið gjørdist ov stórur.

PJ